## Samferðslan og Suðuroy

Leygardagin 12. juni skipar Suðuroyar Skeiðsdepil fyri evnisdegi á Hotell Øravík. Evnið verður Samferðslan og Suðuroy. M.a. verður viðgjørt, hvørt nýggi Smyril fer at kunna nøkta samferðrslutørvin hjá vinnuni og fólki í Suðuroy, serliga hvat viðvíkur flutningskostnað og títtleika av túrunum. Eisini verða tiknir upp spurningar sum broytingar í ferðaætlan og umskipan av umsitingini av Suðuroyarleiðini.

Tríggir fyrilestrar verða hildnir. »Mobilitetur og menning«, við Bjarna Mortensen av Granskingardeplinum fyri Økismenning, »Nýggi Smyril- Nýhugsan á Suðuroyarleiðini«, Jacob Vestergaard, frá Samferðslubólkinum í Suðuroy og »Framtíðarætlanir hjá SSL, við serligum atliti til suðuroyarleiðina, Kristian Davidsen, Stjóra á Strandfaraskipum Landsins.

**Skráin verður hendan:**
Kl 14.00
Bjóðað verður vælkomin
Kl 14.10
Mobilitetur og menning
Kl 14.45
Nýggi Smyril
Kl 15.15
Kjak
Kl 15.45
Steðgur
Kl 16.00
Framtíðarætlanir hjá SSL, við serligur atliti til suðuroyarleiðina
Kl 16.20
kjak
Kl 17.00
evnisdagurin endar

Evnisdagurin er almennur og luttøkan er ókeypis.

**eys**

## Føroyskt ættleiðingarfelag stovnað

3. apríl 2004 varð stovnað eitt føroyskt ættleiðingarfelag.

Ætlanin er, at fara undir ymiskt ítøkiligt arbeiði, m.a. er eitt uppskot um at gera ein faldara um ættleiðing, sum hóskar til føroysk viðurskiftið og føroyskar familjur. Eisini er ætlanin at hava ymisk tiltøk runt um í landinum.

Endamál felagsins er at virka fyri áhugamálum hjá ættleiddum, familjum teirra og hjá teimum, ið ættleiða. Virksemið hjá Ættleiðingarfelagnum hevur støðið í tørvninum og rættindunum hjá barninum, sum ásett í barnasáttmálanum hjá ST og Haag konventiónini viðvíkjandi altjóða ættleiðing.

Í nevndini eru Anninka Marr Poulsen, formaður, Ann Lindberg, kassameistari, Marianna Heinesen, skrivari, Pól Skarðenni og Poul Geert Hansen. Eykalimir eru Leila á Loftið og Bent Albinus. Grannskoðarar eru Sonja Mørkøre og Mary Ann Hansen.

Limagjaldið er 300 kr fyri familjur, 150 kr fyri einstaklingar og 100 kr fyri stuðulslimir.

**eys**

## Føroyingar fingið stuðul til 6 verkætlanir

Norðurlandaráðið hevur nú kunngjørt hvør fær stuðul til norðurlendskt samstarv í 2004 ígjøgnum Nordplus-Junior skipanina. 16 umsóknir komu úr Føroyum, men bert 6 føroyskir skúlar fingu játtan. Teir fáa tilsamans 370.000 kr í flytførisstuðli. Eisini fekk ein verkætlan í Grønlandi og 69 í Danmark játtanir. Tann grønlendska fær 104.000 og tær donsku fáa tilsamans 3,1 mió.

Teir føroysku skúlarnir, sum hava fingið játtan eru:

Skúlin við Ósánna
Venjingarskúlin
Eysturskúlin
Føroya Studentaskúli og Hf skeið – 2 verkætlanir
Føroya Handilsskúli

Til ber at søkja aftur nú. Umsóknarfreistin er 15. oktober 2004. Tiltøkini, sum stuðul verður søktur til, skulu ganga fyri seg í tíðarskeiðnum 1. januar - 31. juli 2005.

**eys**

# NOT Kabarett

**Bergur Rasmussen ummælir**



Situr tú aftan á nátturðan og veit tær einki at gera? Dagur og vika appelerar líkasum ikki beinleiðis til innara svínhundin fyri tíðina? Eg meini so við: Thailendaramálið er loyst; ítróttarfólkini eru her enn; skattalættin fer allarhelst í ommu sína aftur og álvara snakk, hvat ger tað, um vit ikki verða spurd eftir í hernaðarmálum, ella um onkur búskaparfrøðingur hevur verið niðri og tosað um tað, hann hevur skil fyri, nevnliga búskap? Og hvør leggur egentliga í, um breiða semja veruliga bert er samd um ikki at sýna sína ósemju alment?

Hevur tú tað nøkulunda so, at tú kanst taka undir við onkrum av tí, ið omanfyri stendur skrivað, so átti tú at reist teg upp úr sofuni longu nú í kvøld. Síðan burdi tú farið eitt legg oman á títt fyritrekta útskeinkingarstað fyri líkasum at komið í stemning – tað er ikki forboðið at vera í lag saman við góðum vinfólki, ella kanska makanum – og so tá ið einir tveir genstandar eru komnir niðurum, og lagið er vorðið so passaligt, reis teg so aftur, tí fátt er jú meiri tølandi enn at standa fram á ein barrdisk.

Far so út í slavtokuna, ið liggur sum eitt eykent summartekin niður yvir Havnina í hesum døgum, og gakk tær oman á Gamla Meiaríið. – Har bjóðar Gríma nemliga vælkomin á NOT Kabarett, og tú fært eina deiliga sofu at sita í, og júst tí at sessurin er bæði bleytur og góður, er ikki ráðiligt at gera ov nógv av í upphitingini! – At sovna burtur í berari mageligheit er jú bæði býtt og tápuligt, tá ið øll rundan um teg eru um at kódna í látri…

Tí stuttlig er hon – NOT Kabarettin – og tað kennist sárt at skula avdúka plott og poeng fyri tær, ið enn ikki hevur sæð sýningina, serliga um tað ikki verður gjørt spisfindigt nokk, so tað als ikki tykist stuttligt á prenti, tí so spolerar man tað jú bara fyri lesaran, ikki sannheit?

Og bara at staðfesta, sum mín kæri kollega gjørdi herfyri, at »kabarettin er stuttlig, ordiliga stuttlig« tykir mær at vera heldur fátæksligt gjørt yvir fyri tær, tí ummælir eiga at vera eins álítandi og frásøgnin, barnið kemur við, ið var fyrst at stinga bibburnar niður í hylin. – Lesarin eigur at fáa svar uppá sjálvsagda spurningin: Fái eg eitt gott upplivilsi?

Jú, tað fært tú!

Serliga viss tú ert til herligar typulýsingar líka frá teimum framafturgrivnu neytakonunum, ið málbera seg á slíkan hátt, at sjálvt Viderø ikki hevði klovið í tvey; umvegis teir uppiløgstu garparnar, sum sita dagin langan í neystagrundum kring landið alt og reypa um farnar dygdir og spýta langt, um ikki ein ordiliga stórur lítil kann stytta teimum stundir; til tjekkaða sjeikin, ið gongur the catwalk í frískasta føroyska designinum, meðan »Voulez vous cuche avec moi ... ce sois« úr Moulin Rouge fær bjøllurnar at ringja, sum danin vildi sagt.

Men typulýsingarnar steðga ikki her, nei her verður ii'að og åå'að á teimum røttu støðunum, hóast tað ósagda uttan iva sigur meir, enn tað burdi.

Og tey, sum ganga og billa sær inn, at rættvísastu og fittastu menniskjuni á klótuni per automatikk búgva áraka órakað á 62°N og 7°V, fáa aðra reyv at túta í, tí hvassasti broddurin, Gríma borðreiður við á NOT Kabarettini, er ætlaður teimum, ið við vertsliga nazi-insmineraðum strekkmarsji DEFINERA TAÐ, SUM ER NORMALT, meðan tey við góðu bók hangandi leysari frá kokuni brenna ævigt galdandi dogma eftir hampafólki, ið bert ætla sær at seta leik og list upp.

Eitt sindur apropos stingur Tjóðpallur Føroya her trýnið fram fyri fyrstu ferð alment við einum stuttum upplýsandi fyrilestri um, hvussu skemt verður definerað. Og tær tríggjar diva'irnar sleppa fram í spottið við hvør sínum slagara, og tá er tað upp til tínar egnu innaru demonir, hvussu tú taklar vælvaksin sprund við skeggvaksnum vangum sum við truttmunni syngja »I wanna make love to you!« – Men nú tað er vorðið so opilýst í okkara fitta, lítla landi, at preferansurnar kunnu vera ymiskar, so munnu flest øll taka tað við einum smíli, tað verið seg stívt ella óhemmað og breitt…

Sum ein Gríma segði, tá ið eg fekk orð á hana: »Eingin skal føla seg beinleiðis forfylgdan, men øll mugu gjarna føla seg rakt!«

NOT Kabarettin er nevnliga ikki ein Ólavsøkukabarett, ið tekur støði í tápuligheitum, navngivnir persónar (helst politikkarar) hava gjørt síðan seinast, ei heldur er hon at samanlíkna við eitt Norðoyastevnuteiti, ið ger tað sama við norðingar.

NOT Kabarettin rakar breiðari, er meiri almenn enn so, og fevnir víðari, tí hóast eg anbefalaði einar tveir dropar undan sýning og fegin ráði fólki at fara víðari at skemta sær, tá ið tjaldið fer aftur, so ber tað øllum til at koyra sær ein túr til Havnar (og/ella oman í býin), síggja framførsluna, hugna sær og trilla heim aftur og vera ríkaður í sál og sinn. Man behøvist jú ikki at forfalla til ta ramu delikatessu, sum konan gjørdi, ið so ramliga tók til, at »man má insimilera hvønn annan til okkurt annað enn dagligu turbinuna«.

NOT Kabarett er føroyskt skemt, tá ið tað er allarbest, og so er nokk sagt.

Men hinvegin ert tú ikki eitt sindur til skemt, so ert tú neyvan heldur til at fáa upp úr sofuni og liggur allarhelst sum ein annar deyðssiglari bakk frammanfyri kassanum kvøld eftir kvøld, meðan tú undrast á, hví tú ongantíð upplivir nakað stuttligt.

## Næraberg skal til Noregs - og Sundaberg flaggar út



Næraberg skal til umvælingar í Noregi, og Sundaberg verður leigaður út til Týsklands. Av teimum 130 fólkunum, sum fyribils hava mist arbeiðið, eru ikki øll føroyingar. Umleið 80 føroyingar tilsamans sigla við hesum báðum bátunum.

**hkm**



# Meiri lív í miðbýin

**Við nýggju heildarætlanini fyri miðbýin, sum Tórshavnar Býráð legði fram fyri fjølmiðlunum hósdagin, verður væntandi meiri lív í hjartanum av Havnini**

MIÐBÝUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í sambandi við at málið um Degnshús kom fram fyrr í ár, kom tað eisini fram, at Tórshavnar Býráð var farið undir at gera eina heildarætlan fyri allan miðbýin. Hendan ætlan er nú komin undir land, og eitt modell er gjørt av miðbýnum, soleiðis sum hann kemur at síggja út í framtíðini.



*Teir báðir, Jan Christiansen borgarstjóri og Heðin Mortensen, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar býráð við modellmyndini yvir miðbýin í Havn, sum hann væntandi kemur at síggja út í framtíðini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Broyta byggisamtyktina

Nýggja heildarætlanin førir við sær, at tað fer at bera til hjá fólki, sum eiga ogn í Dr. Jacobsensgøtu at víðka um ogn sína. Størsti parturun av áðurnevndu gøtu hevur hoyrt undir tað, ið á fakmáli nevnist 2. grundumráði, men verður nú uppgraderað til 1. grundumráði, sum eitt nú gongugøtan hoyrir undir. Fyri tey, sum eiga ogn í Dr. Jacobsensgøtu, merkir hetta, at tey nú fáa loyvi til at byggja tríggjar hæddir í staðin fyri tvær. Eisini fer tað at verða loyvt at gagnnýta ein størri part av matrikulinum, enn tað higartil hevur borið til.

Býráðið hevur við nýggju ætlanini eisini stungið út í kortið, at økið har Sverrisgøta byrjar við Tinghúsvegin og út til endan á Dr. Jacobsensgøtu við Skálabúðina skal gerast hugaligari at ferðast í. Millum annað verður tað nú ein treyt, at tað skal verða antin handil ella matstova í veghædd, meðan tað ikki fer at bera til at hava skrivstovu beint út til vegin. Eisini skulu gongubreytirnar yvirdekkast við eitt nú karnappum ella marskisum.

Áðrenn avgjørt var, at byggisamtyktin skuldi broytast, høvdu umboð fyri Tórshavnar Býráð ein fund við íbúgvarnar í Dr. Jacobsensgøtu, og sambært borgarstjóranum í Havn, Jan Christiansen, fegnaðust tey um, at ein ætlan nú var gjørd fyri øki. Tó søgdu íbúgvarnir, at tað var ein treyt, at skil fekst á parkeringsviðurskiftini, tí tað mangan var ógjørligt at sleppa av við bilin hjá sær.

### Væl fleiri parkeringsbásar

Tórshavnar Býráð arbeiðir í løtuni við at gera fleiri parkeringspláss í miðbýnum. Millum annað verður arbeitt á einum øki í brekkuni oman fyri gomlu Køkubúðina, og har verða nærum 100 nýggj parkeringspláss, tá ið arbeiðið verður liðugt, sigur formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini hjá Torshavnar Býráð, Heðin Mortensen, og leggur afturat, at frá nýggja parkeringsøkinum eru tað einans einir 100 metrar at ganga oman í Dr. Jacbosensgøtu.

Eisini niðri á Skálatrøð eru fleiri parkeringsbásar á veg. Gomlu skúrarnir hjá arbeiðsmonnunum á Skálatrøð verða tiknir niður, og ístaðin verða fleiri parkeringsbásar gjørdir. Heðin Mortensen sigur, at her verða einir 50-60 nýggir básar. Somuleiðis verður arbeitt við at gera parkeringsplássið aftan fyri politistøðina størri, og hetta skuldi givið rúm fyri gott og væl 20 bilum afturat.

### Fólk skulu eisini venjast við at ganga eitt sindur

Tað ljóðar óivað av nógvum, tá ið so nógvir nýggir parkeringsbásar eru ávegis, men vert er at hava í huga, at eitt nú hevur Tryggingarfelagið Føroyar flutt nógv starvsfólk oman í býin í sambandi við nýggju hølini hjá teimum á Kongabrúnni, og um tað verður meiri lív í miðbýnum, soleiðis sum býráðið ætlar, merkir hetta óivað eisini fleiri arbeiðspláss í hjartanum av Havnini. Til hetta sigur Jan Christiansen, borgarstjóri: – Tað er rætt, at tørvurin á parkeringsplássum í miðbýnum neyvan verður mettaður, men vit noyðast eisini at læra okkum sjálvi at ganga eitt sindur. Til dømis ber tað væl til at parkera í Gundadali við fótbóltsvallirnar og ganga oman í miðbýin, men hetta krevur eina hugburðsbroyting millum okkum føroyingar, heldur borgarstjórin í Havn.

Tað er eisini ein ávís ætlan við skipanini av parkeringsviðurskiftunum í miðbýnum. Jan Christiansen vísir á, at í sjálvari gongugøtuni er parkering tíðaravmarkað til 15 minuttir, men jú longur tú fert frá miðbýnum, jú longri tíð er loyvt at parkera. Hetta er gjørt, so at fólk, ið bert skulu okkurt lítið ørindi í gongugøtuni, kunnu parkera har, meðan tey, ið arbeiða í miðbýnum, noyðast eitt sindur longur burtur at parkera.

### Alt ov nógv óneyðug ferðsla í miðbýnum

Sera nógv ferðsla er gjøgnum miðbýin hvønn dag, og hetta setir sín dám á miðbýarlívið í høvuðsstaðnum. Kanningar, sum Tórshavnar Býráð hevur latið gjørt, vísa, at okkurt um 90 prosent av teimum bilum, ið dagliga koyra gjøgnum miðbýin, hava eingi ørindi í býnum. Hetta eru fólk, sum velja at koyra gjøgnum býin úr eitt nú vesturbýnum niðan í Hoyvíkar, ístaðni fyri heldur at koyra eftir ringvegnum, greiðir Jan Christiansen frá.

Í einari roynd at minka eitt sindur um hesa ferðslu, fer býráðið at kanna, hvørjar avleiðingar tað fer at hava, um tað til dømis verður byrgt fyri, soleiðis at tað ikki fer at bera til at koyra av Tinghúsvegnum út í Bøkjarabrekku.

### Tunnil undir Steinatún

Heðin Mortensen, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini, greiðir somuleiðis frá, at tað eisini hevur verið uppi og vent, um tað er eitt hugskot at fara undir at gera ein tunnil undir Steinatún. Dagliga er sera nógv ferðsla gjøgnum Steinatún, og Heðin Mortensen sigur, at fleiri ferðsluóhapp við yvirkoyrdum fólkum hava verið har, og tað hevði verið gott, um tað var tryggari hjá fótgangarum at koma yvir um vegin. – Ferðslan gjøgnum Steinatún er mangan rættuliga trek, men gjørdu vit ein tunnil undir vegnum, høvdu vit sloppið undan ferðsluljósum, og tað hevði óivað viðført eina meiri glíðandi ferðslu gjøgnum Steinatún, sigur Heðin Mortensen og leggur afturat, at tað mest umráðandi er, at fótgangarin hevur tað gott í miðbýnum.

### Modellmynd gjørd

Í sambandi við nýggju heildarætlanina er, sum áðurnevnt ein modellmynd gjørd av økinum. Á modellinum ber eisini til at síggja, hvussu nýggi skrivstovubygningurin á økinum, har húsini hjá Anton Degn standa í dag, fer at síggja út. Við at seta henda ætlaða bygning í modellmyndina, kann sigast, at Tórshavnar Býráð væntar, at nógv umrøddi bygningurin verður veruleiki.

Eisini ber til at síggja, hvussu tað fer at síggja út fram við Tinghúsvegnum við ætlaða grøna økinum, sum vit eisini umrøddu her í blaðnum fyrr í ár. Millum annað er ætlanin, at klubbagarðurin skal burtur, og eitt torg koma ístaðin.

Modellmyndin, sum Tórshavnar Býráð hevur gjørt, verður sett fram á Snarskivuni, so at ein og hvør borgari, ið hevur hug til at síggja ætlanina, fær møguleika til tað og eisini kann gera viðmerkingar til ætlanina hjá Tórshavnar Býráð.